# Gera klárt at brúka pening á útoyggj

**Í løtuni verður fyrireikað at gera ábøtur á undirstøðukervið í útoyggj, serliga í Skúvoy, har ætlanin er at gera nýggja havn fyri yvir 20 milliónir**



*Skal Skúvoy verða lív lagað, er neyðugt við betri havn og tað arbeiðir landsstýrið við*

ÚTOYGGJAMENNING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í løtuni roynir Vinnumálaráðið, saman við Landsverki, at finna útav, hvussu bøtast kann um undirstøðukervið í útoyggjum.

Løgtingið hevur aftur í ár samtykt at brúka tríggjar milliónir til at bøta um undirstøðukervið í útoyggjunum.

Og í Løgtinginum nú ein dagin sóknaðist Páll á Reynatúgvu, løgtingsmaður, eftir, hvussu ætlanin er at brúka hendan peningin.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum greiddi frá, at av teimum trimum milliónunum, eru 2,6 milliónir markaðar til at gera havn í Skúvoy.

Sostatt eru 400.000 krónur eftir til onnur endamál.

Ymsar útoyggjar hava søkt um at fáa burturav stuðlinum og í løtuni er Landsverk í ferð við at kanna umsóknirnar. Tá ið hann er liðugur, leggur hann eitt tilmæli fyri landsstýrismannin í vinnumálum, sum síðani tekur støðu.

Og fyrrenn Landsverk er liðugur, ber ikki til at siga nakað um, hvussu peningurin verður brúktur.

Hinvegin vísti landsstýrismaðurin á, at í Skývoy er ein betri havn tað mest alneyðuga av øllum, tí annars er oynni ikki lív lagað.

Hann sigur, at projekt til nýggja havn, er klárt

Og nú verður viðgjørt, hvussu tær 2,6 milliónir kunnu brúkast til havnina og, hvussu tað ber til at byrja uppá nýggja havn í Skúvoy fyri pengarnar. Hann helt, at tað er rætt at bera skjótt at við at gera havnina í Skúvoy.

- Men so mugu løgtingslimir ásanna, at brúk verður fyri 20 milliónum afturat, legði hann afturat. Og tað roknistykki roynir landsstýrismaðurin nú at fáa at ganga upp.

Annars hava fleiri útoyggjar roynt at fáa breiðband í oygjgarnar burturav stuðlinum. Men Bjarni Djurholm upplýsti fyri Løgtinginum, at hetta var ein íløga, sum Føroya Tele sjálvt vildi standa fyri, og fíggja.




# Volvo gevur boð uppá Nissan Diesel

MARKNAÐARRÁK

Volvo hevur endiliga latið sítt boð inn uppá 55% av Nissan Diesel. Ætlanin er at brúka sterku støðuna hjá Nissan Diesel í Asia, at vaksa um virksemi sítt har. Keypið fer væntandi ikki at hava stóra ávirkan á inntøkurnar í stutta tíðarskeiðnum, men gevur Volvo stórar inntøkumøguleikar sum frálíður.

Roknskapurin hjá Carlsberg vísti, at sølan gjørdist sum væntað, meðan vøksturin serliga stavaði frá Baltic Brewery Holding (BBH). Í Vesturevropa og hjá BBH gjørdust inntøkan størri enn væntað.

Eftir vinningsstaðfesting á partabrævamarknaðunum í undanfarnu viku, eru vísutølini hækkaði aftur. Fyrr umtalaða rættingin er framvegis í væntu. Tó er ilt at siga just nær hon verður.

### Dollarin viknaður

Hesa farnu vikuna er amerikanski dollarin viknaður mótvegis krónuni. Hann viknaði 1,4%, úr 5,74 í 5,66. Annars hevur dollarin ligið millum 5,71-5,78 seinasta mánaðin. Harvið eydnaðist ikki á hesum sinni at fáa dollaran upp um 6,00 kr. Útlit eru nú fyri, at hann fer at vikna niður móti 5,60 kr. Orsøkin til lækkingina í farnu viku var í stóran mun, at peningur streymaði úr USA til íløgur í útlondum. 11 mia. dollarar var netto streymurin úr USA. Væntað var ein netto innstreyming av peningi til USA á 70 mia. dollarar. USA hevur tørv á 60-70 mia. dollarum úr útlandinum hvønn mánaða til at fíggja met-stóra hallið á gjaldsjavnanum.

### Lánsbrævarentur støðugar

Lánsbrævarentur vóru aftur støðugar hesa farnu vikuna. 10-ára rentan er 4,08%. 1-árs rentan er í løtuni umleið 4,25%. Hon er sostatt ikki ávirkað av, at ECB gav ábendingar um, at stutta rentan verður sett upp í næsta mánað. Hetta var longu innroknað í lánsbrævarenturnar.

### Hesa vikuna

Hesa vikuna verður rentupolitikkurin í USA í andgletti. Haðani kemur uppritið frá seinasta rentufundinum í tjóðbankanum, umframt prísvøksturin í januar. Hetta gevur ábendingar um rentupolitikkin komandi tíðina, og hevur stóran týdning fyri allar marknaðir.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 566,74 | -1,4% |
| JPY | 4,74 | 0,6% |
| GBP | 1.105,97 | -1,2% |
| NOK | 92,67 | 0,8% |
| SEK | 80,75 | -1,0% |

**Virðisbrøv**

| Norrøn | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 98,29 | 0,1% |
| Norrøn Partabrøv | 133,08 | 0,5% |
| **VMF** | **Kursur** | **+/- %** |
| Atlantic Petroleum | 612,50 | 6,1% |
| KB Trygg Eurostoxx | 109,21 | 0,5% |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*

*Vika 8, 2007*